NORÐOYA SPARIKASSI





NORÐOYA SPARIKASSI

**Høvuðsdeildin**
Hovedafdeling

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. +298 475000
ns@ns.fo
www.ns.fo

**Deildin í Fuglafirði**
Fuglafjørður afdeling

Í Støð 7
FO-530 Fuglafjørður
Tel. +298 475000

**Deildin í Tórshavn**
Tórshavn afdeling

Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 475000

ns.fo

# Frágreiðing um góða virkisleiðslu 2024

Norðoya Sparikassi er limur í Finans Danmark, ið mælir øllum limum sínum til, at halda seg til tilráðingarnar frá "Komitéen for god Selskabsledelse". Síðan tilráðingarnar frá nevndini byrjaðu í 2001, eru tær broyttar fleiri ferðir. Seinasta dagføringin í desember 2020 tók við 1. januar 2021. Mælt verður til at feløg greiða frá, um tey fylgja tilráðingunum ella ikki. Um ein tilráðing ikki verður fylgd, eigur felagið at greiða frá, hvør orsøkin er til at hetta ikki verður gjørt, og hvat felagið hevur valt at gera í staðin.

Finans Danmark hevur gjørt eitt leiðsluhandrit við tilráðingum til limir sínar. Tilráðingarnar frá Finans Danmark eru meira víðfevnandi enn lógarkrøvini og tilráðingarnar frá "Komitéen for god Selskabsledelse". Endamálið við tilráðingunum er at fáa limirnar at taka støðu til týðandi evni innan leiðslu, og at skapa størri opinleika um leiðslukarmarnar hjá limum sínum og harvið økja um álitið á bankageiran.

Sparikassin metir, at góð virkisleiðsla er ein fyritreyt fyri góðum samstarvi millum sparikassan og áhugapartarnar (kundar, ábyrgdarar, starvsfólk, samfelagið v.m.) og samstundis at røkka góðum úrslitum.

Frágreiðingin um góða virkisleiðslu fylgir "fylg ella greið frá" meginregluni.

## Innihald:


- Tilmæli frá "Komitéen for god Selskabsledelse" (s. 2-13)
- Tilmæli frá Finans Danmark (s. 14-17)

## Tilmæli frá "Komitéen for god Selskabsledelse"

Ráðið fyri góða virkisleiðslu hevur útgivið eina røð av tilmælum um góða virkisleiðslu. Tilmælini eru at finna á corporategovernance.dk.

### 1. Felagsins samskifti og samspæl við íleggjarar og aðrar áhugapartar

**1.1. Samskifti millum felagið, partaeigarar og aðrar áhugapartar**

| | |
|---|---|
| 1.1.1. Mælt verður til, at leiðslan við einum støðugum samskifti tryggjar partaeigarum, íleggjarum og øðrum áhugapørtum viðkomandi innlit í felagsins viðurskifti, og at nevndin fær møguleika til at kenna og koma við teirra sjónarmiði til arbeiðið. | Sparikassin fylgir<br><br>Sum ábyrgdarsparikassi og sjálvsognarstovnur hevur sparikassin ongar partaeigarar. Við ársenda 2024 hevði sparikassin 2090 ábyrgdarar. Ábyrgdarar kunnu finna upplýsingar um sparikassans virksemi á heimasíðu sparikassans. Leiðslan hevur tveir fundir um árið við umboðsráðslimir sparikassans. |
| 1.1.2. Mælt verður til, at felagið ger politikkir viðvíkjandi felagsins viðurskiftum mótvegis partaeigarum, íleggjarum og møguligum øðrum áhugapørtum fyri at tryggja, at tey ymisku áhugamálini verða tikin við í felagsins hugsanir og at hesir politikkir eru at finna á heimasíðu felagsins. | Sparikassin fylgir<br><br>Víst verður til 1.1.1 omanfyri. |
| 1.1.3. Mælt verður til, at felagið almannakunnger ársfjórðingsfrágreiðingar. | Sparikassin fylgir ikki<br><br>Sparikassin metir tó, at almannakunngering av lógarásettum ársroknskapi og hálvársroknskapi gevur nøktandi innlit í sparikassans roknskaparviðurskifti. |

**1.2. Aðalfundurin**

| | |
|---|---|
| 1.2.1. Mælt verður til, at nevndin í fyrireikingunum til ársaðalfundin ber soleiðis í bandi, at eigarar, ið ikki hava møguleika at vera fysiskt til staðar ella eru umboðaðir til ársaðalfundin, kunnu greiða atkvøðu og frammanundan ársaðalfundinum ella á aðalfundinum kunnu seta leiðsluni spurningar. Mælt verður til, at nevndin tryggjar partaeigarum møguleikan at luttaka á ársaðalfundinum via webcast ella aðrari talgildari loysn. | Sparikassin fylgir lutvíst<br><br>Umboðsráðið er hægsti myndugleiki sparikassans. Tí er talan ikki um aðalfund, men umboðsráðsfund. Umboðsráðið fær innkalling til umboðsráðsfundin og umboðsráðslimirnir kunnu á fundinum seta nevnd og stjórn spurningar um viðurskifti sparikassans. Umboðsráðsfundirnir verða ikki stroymdir. |
| 1.2.2. Mælt verður til, at partaeigarar í fulltrúum ella brævatkvøðum, til nýtslu á aðalfundinum, hava møguleika at taka støðu til hvørt einstakt punkt á dagskránni. | Sparikassin fylgir ikki<br><br>Atkvøðast kann ikki við fulltrú. |

### 1.3. Yvirtøkuroynd

1.3.1. Mælt verður til, at felagið hevur eina tilbúgvingarmannagongd fyri yvirtøkuroyndir, sum inniheldur eina ætlan um tey viðurskifti, sum nevndin eigur at umhugsa og taka støðu til, um eitt yvirtøkutilboð verður givið ella um nevndin fær grundaðan illgruna um, at yvirtøkutilboð fer at verða givið.

Umframt hetta verður mælt til, at tað í mannagongdini verður ásett, at nevndin aftrar seg við at ganga yvirtøkutilboðnum á møti uttan góðkenning frá aðalfundinum við at taka avgerðir, sum í veruleikanum forða partaeigarunum í at taka støðu til yvirtøkuroyndina.

Sparikassin fylgir ikki

Nevndin metir, at ein tilbúgvingarmannagongd fyri yvirtøkuroyndir er óneyðug, av tí at sparikassin er ein sjálvsognarstovnur og yvirtøkuroynd kann tískil ikki beinleiðis fara fram.

### 11.4 Samfelagsábyrgd

1.4.1 Mælt verður til, at nevndin góðkennir ein politik fyri samfelagsábyrgd, undir hesum sosialari ábyrgd og burðardygd og at hesin politikkur er tøkur í leiðslufrágreiðingini í ársfrásøgnini og/ella á heimasíðu felagsins. Mælt verður til, at nevndin hevur eftirlit við, at gjørt verður eftir politikkinum.

Sparikassin fylgir ikki

Nevndin hevur ikki samtykt nakran formligan politikk fyri samfelagsábyrgd, sociala ábyrgd ella burðardygd, men arbeitt verður við hesum.

1.4.2 Mælt verður til, at nevndin góðkennir ein skattapolitik sum er tøkur á heimasíðu felagsins.

Sparikassin fylgir ikki

Nevndin hevur ikki samtykt ein skattapolitikk.

## 2. Uppgávur og ábyrgd hjá nevnd

### 2.1. Yvirskipaðar uppgávur og ábyrgd

2.1.1. Mælt verður til, at nevndin sum liður í at stuðla undir endamáli felagsins sambært viðtøkum og langtíðar virðisskapan, heldur seg til endamálið og tryggjar og fremur eina góða virkismentan og góð virðir. Felagið eigur at greiða frá hesum í leiðslufrágreiðingini og/ella á heimasíðu felagsins.

Sparikassin fylgir

2.1.2. Mælt verður til, at nevndin í minsta lagi árliga umrøður og leypandi fylgir við felagsins yvirskipaðu strategi fyri at tryggja virðisskapanina í felagnum.

Sparikassin fylgir

2.1.3. Mælt verður til, at nevndin leypandi hyggur eftir, um felagið hevur ein kapital- og partabrævabygnað, sum stuðlar undir at felagsins strategi og langtíðar virðisskapan eru í tráð við áhugamálini hjá partaeigarunum og felagnum. Harumframt at greitt verður frá hesum í leiðslufrágreiðingini í ársfrásøgnini hjá felagnum og/ella á felagsins heimasíðu.

Sparikassin fylgir

Sparikassin er ábygdarsparikassi og sjálvsognarstovnur og hevur ikki partaeigarar.

| | |
|---|---|
| 2.1.4. Mælt verður til, at nevndin ger og árliga gjøgnumgongur reglugerð fyri stjórn, og undir hesum krøv til at geva frágreiðing til nevndina. | Sparikassin fylgir |

**2.2. Nevndarlimir**

| | |
|---|---|
| 2.2.1. Mælt verður til, at næstformaður verður valdur í nevndina, sum virkar fyri formannin, skuldi hesin fingið forfall, og annars virkar sum ein góður sparringspartnari hjá formanninum. | Sparikassin fylgir |
| 2.2.2 Mælt verður til, at formaðurin í samstarvi við einstøku nevndarlimirnar tryggjar, at limirnir leypandi dagføra og endurnýggja teirra vitan um viðkomandi viðurskifti og at serlig vitan hjá limunum verður gagnnýtt á bestan hátt. | Sparikassin fylgir |
| 2.2.3. Mælt verður til, at um nevndin hendingaferð biður nevndarformannin ella aðrar nevndarlimir um at gera serligar uppgávur fyri felagið, t.d. at taka lut í dagligu leiðsluni, skal nevndin góðkenna hetta fyri at tryggja, at nevndin varðveitir tað yvirskipaðu leiðsluna og eftirlitsskipanina. Mælt verður til, at felagið almannakunnger avgerð um luttøku nevndarlimsins í tí dagligu leiðsluni og í so fall hvussu leingi luttøkan væntast at vara. | Sparikassin fylgir<br>Hetta hevur ikki verið viðkomandi støða í farna roknskaparári. |

## 3. Samanseting og skipan av nevnd

**3.1. Samanseting**

| | |
|---|---|
| 3.1.1. Mælt verður til, at nevndin árliga gjøgnumgongur og í leiðslufrágreiðingini og/ella á heimasíðu felagsins upplýsir:<br>▪ hvørjar førleikar nevndin í síni heild og og hvør einstakur nevndarlimur eigur at ráða yvir fyri best møguligt at kunna røkja sínar skyldur.<br>▪ samansetingina og margfeldi í nevndini. | Sparikassin fylgir |
| 3.1.2. Mælt verður til, at nevndin árliga umrøður virksemi felagsins fyri at tryggja, at felagið hevur eitt viðkomandi fjølbroytni í felagsins leiðslustigum, og harumframt ger og samtykkir ein politik fyri fjølbroytni og at hesin er tøkur í leiðslufrágreiðingini í ársfrásøgnini og/ella verður lýstur á heimasíðu felagsins. | Sparikassin fylgir |
| 3.1.3. Mælt verður til, at útvegan av valevnum til nevndina verður gjørd við nærlagni og fyri nevnd á ein gjøgnumskygdan hátt, sum nevndin hevur góðkent. Tá mett verður um valevnir skal umframt einstakar førleikar og útbúgving eisini takast atlit til tørv á kontinuiteti, endurnýggjan og fjølbroytni. | Sparikassin fylgir |

3.1.4. Mælt verður til, at tað saman við innkallingini til aðalfundin, har nevndarval er á skrá, umframt ásetingarnar í lóggávuni, verður send út ein lýsing av førleilkunum hjá teimum uppstillaðu valevnunum og uppýsingar um:
- onnur leiðslustørv, undir hesum leiðslustarv í vinnurekandi fyritøkum, íroknað leiðslunevnd.
- krevjandi fyriskipanaruppgávur.

Umframt hetta skal upplýsast um valevnini til nevndina verða mett sum óheft.

Sparikassin fylgir

3.1.5 Mælt verður til, at aðalfundarvaldu nevndarlimirnir standa fyri vali hvørt ár á tí regluliga aðalfundinum og at hesir verða uppstillaðir og hvør fyri seg.

Sparikassin fylgir ikki

Sambært viðtøkum sparikassans sita nevndarlimir valdir av umboðsráðnum í trý ár í senn. Hvørt ár standa tveir limir fyri vali. Nevndin metir, at núverandi valskipan tryggjar framhald og støðuleika í nevndararbeiðinum.

**3.2. Óheftni nevndarinnar**

3.2.1. Mælt verður til, at í minsta lagi helvtin av aðalfundarvaldu nevndarlimunum eru óheftir, soleiðis at nevndin kann virka óheft av seráhugamálum.

Fyri at vera óheftur, má viðkomandi ikki:
- vera ella innan seinastu 5 árini hava verið limur í stjórnini ella leiðandi starvsfólk í felagnum, einum dótturfelag ella einum tilknýttum felag
- innan seinastu 5 árini hava móttikið størri samsýning frá felagnum/samtakinum, einum dótturfelag ella einum tilknýttum felag í øðrum eginleika enn limur í nevndini
- umboða áhugamál hjá ella hava tilknýti til ráðandi partaeigara
- innan seinasta árið hava havt eitt handilssamband (t.d. persónligt ella óbeinleiðis sum partnari ella starvsettur, partaeigari, kundi, veitari ella limur í leiðsluni í feløgum við líknandi sambondum) við felagið, eitt dótturfelag ella eitt tilknýtt felag, sum er týðandi fyri felagið/og ella handilssambandið
- vera ella innan seinastu trý árini hava verið starvsettur ella partnari hjá uttanhýsis grannskoðara
- vera stjóri í einum felag, sum hevur tvørgangandi leiðsluumboðan við felagið
- hava verið nevndarlimur í meiri enn 12 ár
- vera í tøttum familjusambondum við persónar, sum ikki kunna metast at vera óheftir.

Hóast ein nevndarlimur ikki er fevndur av omanfyristandandi eyðkennum kunnu tað vera onnur viðurskifti sum gera, at nevndin tekur avgerð um, at ein ella fleiri nevndarlimir ikki kunnu roknast at verða óheftir.

Sparikassin fylgir

3.2.2 Mælt verður til, at limir í felagsins stjórn ikki eru nevndarlimir og at ein fráfarandi stjóri ikki fer beinleiðis inn í felagsins nevnd.

Sparikassin fylgir

### 3.3. Nevndarlimir og tal av øðrum leiðslustørvum

3.3.1. Í sambandi við árliga eftirmeting sambært tilmæli 3.5.2 verður mælt til, at nevndin og hvør einstakur nevndarlimur metir um, hvussu nógv tíð er neyðug at brúka upp á nevndararbeiðið. Endamálið er at viðkomandi ikki tekur á seg fleiri størv enn at nevndararbeiðið kann útinnast á ein nøktandi hátt fyri felagið.

Sparikassin fylgir

3.3.2. Mælt verður til, at leiðslufrágreiðingin, umframt ásetingarnar í lóggávuni, inniheldur hesar upplýsingar um nevndarlimirnar:
- starv, aldur og kyn
- førleikar og útbúgving, sum er viðkomandi fyri felagið
- óheftni
- árstalið tá nevndarlimurin kom inn í nevndina
- árstal tá galdandi valtíðarskeiðið gongur út
- uppmøting hjá viðkomandi til fundir í nevnd og undirnevndum
- leiðslustørv í vinnurekandi fyritøkum, undir hesum sessir í leiðslunevndum, umframt krevjandi fyriskipanaruppgávur
- nøgd av partabrøvum, optiónum, warrants og líknandi í felagnum og tey gjøgnum felagið knýttu samtaksfeløgum, sum nevndarlimurin eigur, og tær broytingar í virðisbrævagoymslu hjá nevndarliminum av nevndu virðisbrøvum, sum eru farnar fram í roknskaparárinum.

Sparikassin fylgir lutvíst

Sparikassin hevur ongar partaeigarar. Tískil kann ikki upplýsast um nøgd av partabrøvum hjá nevndarlimum í sparikassanum.

Sparikassin upplýsir ikki uppmøting hjá hvørjum einstøkum nevndarlimi, men upplýsir samlaðu uppmøtingina til fundir.

### 3.4. Undirnevndir

3.4.1. Mælt verður til, at leiðslan í leiðslufrágreiðingini í ársfrásøgnini lýsir:
- høvuðsvirksemi hjá undirnevndunum í árinum og talið av fundum í hvørjari nevnd
- nøvnini á umboðunum í teimum einstøku undirnevndunum, undir hesum nevndarformenn og upplýsing um, hvørjir limir eru óheftir.

Sparikassin fylgir

Einasta undirnevnd er tilráðingarnevnd og kommissorium fyri hesa sæst á heimasíðu sparikassans.

3.4.2. Mælt verður til, at einans nevndarlimir sita í undirnevndum og at meirilutin av undirnevndarlimunum eru óheftir.

Sparikassin fylgir

3.4.3. ▪ Mælt verður til, at nevndin setur eina grannskoðanarnevnd og tilnevnir formann fyri grannskoðanarnevndina, ið ikki er nevndarformaður. Mælt verður til, at grannskoðanarnevndin umframt lógarásettar uppgávur hjálpir nevndini at:

▪ hava eftirlit við rættleika av almannakunngjørdum fíggjarligum upplýsingum, undir hesum roknskaparsiðvenju á týðandi økjum, týðandi roknskaparligum metingum og transaktiónum við nærstandandi partar

▪ gjøgnumganga innanhýsis eftirlits- og váðaøki fyri at tryggja stýring av teimum størstu váðunum, undir hesum eisini kunning um útlit

▪ meta um tørvin á innanhýsis grannskoðan

▪ skipa fyri eftirmeting av aðalfundarvaldum grannskoðara

▪ hava eftirlit við vavi av tænastum, frá aðalfundarvaldum grannskoðara, ið ikki eru vanligar grannskoðanartænastur

▪ tryggja regluligt samskifti millum aðalfundarvaldan grannskoðara og nevnd, m.a. við at nevndin hevur fund við grannskoðanarnevndina í minsta lagi eina ferð um árið uttan luttøku av stjórn.

Um so er, at nevndin eftir tilráðing frá grannskoðanarnevndini tekur avgerð um at seta á stovn innanhýsis grannskoðan, tá er setningurin hjá grannskoðanarnevndini at:

▪ gera kommissorium og tilráðing um val, setan og uppsøgn av leiðara av innanhýsis grannskoðan og fíggjarætlan fyri hesa

▪ hava eyga við, at innanhýsis grannskoðanin verður tillutað nóg mikið av arbeiðsmegi og førleikum at fremja ásetta arbeiðið

▪ hava eftirlit við leiðslunnar uppfylging av niðurstøðum og tilmælum frá innanhýsis grannskoðanini.

Sparikassin fylgir ikki

Nevndin tók í 2021 avgerð um, at avtaka grannskoðanarnevndina. Hetta verður mett at verða ráðiligt við tað at arbeiðið hjá grannskoðanarnevndini kann røkjast av nevnd sparikassans.

3.4.4. Mælt verður til, at nevndin setur á stovn ein tilráðingarbólk, sum í minsta lagi hevur hesar fyrireikandi uppgávur:

▪ lýsir førleikarnar, sum eru neyðugir í nevndini og stjórnini og til eitt ávíst starv, og at áseta tíðarnýtsluna, ið verður mett skal setast av til at røkja starvið og eisini meta um førleikar, vitan og royndir, sum eru/eiga at vera í teimum báðum leiðsluskipanunum,

▪ árliga meta um bygnaðin, støddina, samansetingina og úrslit hjá stjórn og nevnd og eisini gera tilráðingar til nevndina um møguligar broytingar,

▪ í samstarvi við formannin skipa fyri árligu eftirmeting-

Sparikassin fylgir

ini í nevnd og meta um førleikar, vitan og royndir og successión hjá nevndarumboðunum og eisini geva nevndini frágreiðing um hetta
▪ skipa fyri at útvega nýggj evni til nevnd- og stjórn og seta fram uppskot um evni til nevnd at góðkenna
▪ tryggja, at gjørd verður ein successiónsætlan fyri stjórn
▪ hava eftirlit við politikki stjórnarinnar um setan av leiðandi starvsfólkum
▪ hava eftirlit við, at gjørdur verður ein politikkur fyri margfeldi at góðkenna av nevnd.

3.4.5. Mælt verður til, at nevndin setur á stovn eina lønarnevnd, sum í minsta lagi hevur hesar fyrireikandi uppgávur:
▪ gera uppskot til nevndina um lønarpolitik at góðkenna áðrenn hetta uppskot verður lagt fyri ársaðalfundin til góðkenningar
▪ seta fram uppskot til nevndina um samsýning til stjórn
▪ seta fram uppskot til nevndina um samsýning til nevndarlimir at leggja fram fyri ársaðalfundin
▪ tryggja, at samsýning til stjórn er í samsvari við lønarpolitikkin hjá felagnum og metingina av avrikinum hjá viðkomandi
▪ hjálpa til við at fyrireika árligu frágreiðingina um samsýning at góðkenna av nevnd frammanundan vegleiðandi atkvøðugreiðslu á ársaðalfundinum.

Sparikassin fylgir ikki

Nevndin tók í 2021 avgerð um, at avtaka lønarnevndina. Hetta verður mett at verða ráðiligt av tí at arbeiðið hjá lønarnevndini kann røkjast av nevnd sparikassans.

**3.5. Eftirmeting av arbeiðnum í nevndini og stjórnini**

3.5.1. Mælt verður til, at nevndin eina ferð um árið ger eina eftirmeting av nevndini og uttanhýsis ráðgevarar eiga í minsta lagi triðja hvørt ár at verða tiknir við í eftirmetingina. Mælt verður til, at tað í eftirmetingini verður lagdur dentur á tilmæli um nevndarinnar arbeiði, virkni, samanseting og skipan, sambært tilmæli 3.1 – 3.4 omanfyri og at eftirmetingin fevnir um:
▪ samanseting av nevnd við denti á førleikar og margfeldi
▪ íkast og úrslit hjá einstøku nevndarlimunum og nevndini sum heild
▪ samstarvið í nevndini og millum nevnd og stjórn
▪ formansins leiðsla av nevnd
▪ arbeiðið í undirnevndum og nevndarbygnaður
▪ fyrireiking av nevndararbeiðinum og dygdin av tí tilfari, ið nevndin fær
▪ fyrireiking til fundirnar og virkni til fundirnar hjá einstøku nevndarlimunum.

Sparikassin fylgir

3.5.2. Mælt verður til, at nevndin í síni heild umrøður úrslitið av eftirmeting av nevnd og at mannagongdin fyri eftirmetingina saman við niðurstøðunum av eftirmetingini verður nevnd í leiðslufrágreiðingini í ársfrásøgnini, á heimasíðu felagsins og á ársaðalfundinum.

Sparikassin fylgir

Nevndin hevur í fleiri ár nýtt eina skipaða mannagongd til at eftirmeta, um nevndin hevur neyðugar førleikar og royndir í mun til virkisgrundarlag sparikassans. Henda eftirmeting byggir á vegleiing frá Fíggjareftirlitinum um, hvussu slík eftirmeting av nevndarlimum í peningastovnum skal fremjast.

Sum liður í hesi eftirmeting hevur nevndin eisini greinað, hvørjir førleikar eru neyðugir fyri at tryggja, at nevndin kann røkja sítt arbeiði á fullgóðan hátt. Hendan greining tekur atlit til virkisgrundarlagið hjá sparikassanum og teir váðar, ið eru knýttir at virkseminum.

Nevndin hevur ásett nøkur yvirskipað førleikakrøv, sum fevna um kunnleika og innlit í viðkomandi øki og váðar. Við støði í hesum hevur hvør einstakur nevndarlimur mett um sínar egnu førleikar.

Harumframt hevur nevndin gjørt eina samlaða eftirmeting av arbeiðinum og samstarvinum í nevndini. Úrslitið av eftirmetingini verður viðgjørt og umrøtt í nevndini.

Árliga eftirmetingin varð seinast framd í oktobur 2024.

Niðurstøðan frá eftirmetingini var, at samstarvið í nevndini var nøktandi, og at nevndarlimirnir í felag hava ta neyðugu vitan, fakligu førleikarnar og royndirnar, sum skulu til fyri at skilja virksemið hjá sparikassanum og teir váðar, ið eru knýttir at hesum.

3.5.3. Mælt verður til, at nevndin í minsta lagi árliga metir um arbeiðið og úrslitini hjá stjórnini sambært frammanundan ásettum metingarstøði, og at formaðurin gjøgnumarbeiðir hetta saman við stjórnini. Harafturat eigur nevndin loypandi at meta um tørvin á broytingum í stjórnarbygnaði og samanseting, undir hesum margfeldi, successiónsætlanir og váða við atliti til felagsins strategi.

Sparikassin fylgir

## 4. Samsýning hjá leiðsluni

### 4.1. Samsýning til nevnd og leiðslu

| | |
|---|---|
| 4.1.1. Mælt verður til, at samsýning til nevnd og leiðslu umframt aðrar setanartreytir er bæði kappingarfør og sambærlig við felagsins langtíðar partaeigaraáhugaamál. | **Sparikassin fylgir**<br>Sparikassin hevur tó sum fyrr nevnt ongar partaeigarar. |
| 4.1.2. Mælt verður til, at partabrævatengd samsýning skal vera revolverandi, t.v.s. tillutast skeiðbundið og fyrst og fremst langtíðar við einum innvinningar- og búðningarskeiði upp á í minsta lagi trý ár. | **Sparikassin fylgir**<br>Lønarpolitikkur sparikassans inniheldur ikki skiftiligar lønarlutir. |
| 4.1.3. Mælt verður til, at tann skiftandi lønarluturin hevur eitt ovara mark, av tí at hesin verður tillutaður og at tað er gjøgnumskygni um møguliga virði tá hesin verður gagnnýttur. Hetta skal verða lýst við dapurskygdari væntaðari og bjartskygdari framtíðarmynd. | **Sparikassin fylgir**<br>Lønarpolitikkur sparikassans inniheldur ikki skiftiligar lønarlutir. |
| 4.1.4. Mælt verður til, at avtalur um samsýning í uppsagnartíðini, íroknað fráfaringarsamsýning, í mesta lagi hava eitt virði, sum svarar til samsýningina tvey tey seinastu árini íroknað allar samsýningarlutir. | **Sparikassin fylgir**<br>Nevndarlimir verða samsýntir við føstum samsýningum. |
| 4.1.5. Mælt verður til, at nevndarlimir ikki verða løntir við partabrævaoptiónum ella tekningsoptiónum. | **Sparikassin fylgir**<br>Sparikassin fylgir<br>Sparikassin hevur ongar partaeigarar. |
| 4.1.6 Mælt verður til, at felagið hevur møguleika til at krevja alt ella partvís afturgjald av skiftandi samsýning frá bæði stjórn og nevnd, um so er, at samsýningin er tillutað, forvunnin ella útgoldin grundað á upplýsingar, sum síðani vístu seg at verða skeivir, ella at móttakarin var illvarin um onnur viðurskifti, sum førdu til, at útgoldin var ov nógv í skiftandi samsýning. | **Sparikassin fylgir**<br>Lønarpolitikkur sparikassans inniheldur ikki skiftiligar lønarlutir. |

## 5. Váðastýring

### 5.1. Eyðmerking av váðum og opinleiki um fleiri viðkomandi upplýsingar

| | |
|---|---|
| 5.1.1. Mælt verður til, at nevndin við støði í felagssins strategi og handilsmodelli tekur støðu til t.d. teir týðandi strategisku og handilsligu, roknskaparligu og gjaldførisligu váðarnar. Felagið eigur í leiðslufrágreiðingini at greiða frá hesum váðunum, umframt váðastýringini hjá felagnum. | Sparikassin fylgir |
| 5.1.2. Mælt verður til, at nevndin setir í verk eina whistleblowerskipan, har møguleiki er hjá starvsfólkum og øðrum áhugapørtum at fráboða álvarsom misbrot ella illgruna um hetta á ein hóskandi hátt, og at ein mannagongd tryggjar at fráboðanir verða viðgjørdar í trúnaði. | Sparikassin fylgir lutvíst<br><br>Sparikassin hevur sambært lóg um fíggjarvirksemi stovnsett eina innanhýsis whistleblowerskipan, har starvsfólk í trúnaði kunnu fráboða brot ella møgulig brot á fíggjarligu lóggávuna. |

## Tilmæli frá Finans Danmark

Finans Danmark hevur gjørt eitt leiðsluhandrit við tilmælum til limir sínar. Tilmælini frá Finans Danmark eru meiri víttfevnandi enn lógarkrøvini og tilmælini frá "Komitéen for god Selskabsledelse". Tilmælið er gjørt av Finansrådet í november 2013.

| Tilmæli | | |
|---|---|---|
| 1. | Mælt verður til, at limirnir í Finans Danmark taka støðu til øll tilmælini frá "Komitéen for god selskabsledelse". | Sparikassin fylgir |
| 2. | Mælt verður til, at limirnir í Finans Danmark gera og almannakunngera eina atferðarlóg (code of conduct), sum greiðir frá virðisgrundarlagnum hjá felagnum og ynskta atferð í rakstri og leiðslu hjá felagnum. | Sparikassin fylgir ikki<br><br>Sparikassin metir, at almenningurin fær nøktandi kunnleika til virðisgrundarlag og ynskta atferð í rakstri og leiðslu gjøgnum dagliga virksemi sparikassans. Haraftrat kemur virðisgrundarlag sparikassans og atferð til sjóndar í ársfrásøgnini, ið er at finna á heimasíðuni. |
| 3. | Mælt verður til, at limirnir í Finans Danmark brúka eina gjølla lýsta og skipaða tilgongd í sambandi við útvegan av valevnum til nevnd og møguliga gera nýtslu av uttanhýsis førleikum. | Sparikassin fylgir |
| 4. | Mælt verður til, at um limirnir í Finans Danmark hava ásetingar í viðtøkunum um, at nevndarlimir einans skulu veljast innanfyri avmarkaðan bólk av persónum og greiða frá grundgevingunum fyri hesum avmarkingum. | Sparikassin fylgir<br><br>Viðtøkurnar hava ikki slíka avmarking. |
| 5. | Mælt verður til, at nevndarlimir skjótast gjørligt, og í seinasta lagi 6 mánaðir eftir nevndarval, byrja eina útbúgvingartilgongd í rakstri av banka, um nevndarlimurin ikki longu hevur dagførdar og serligar bankaførleikar. Tilgongdin skal taka støði í støddini á felagnum, virkisgrundarlagi og kompleksiteti. | Sparikassin fylgir |
| 6. | Mælt verður til, at nevndarlimirnir fáa áhaldandi førleikamenning, um tað er viðkomandi fyri nevndararbeiði. Evni og vavið skal vera tillagað støddini á felagnum, virkisgrundarlagi og kompleksiteti. | Sparikassin fylgir |
| 7. | Mælt verður til, at hvør einstakur nevndarlimur árliga metir um sítt arbeiði í nevndini. Nevndarlimurin skal, sum liður í metingini, fylla út eitt metingaroyðiblað, sum viðvíkur øki bæði innan leiðslu og bankatøkni. | Sparikassin fylgir |

| | | |
|---|---|---|
| 8. | Mælt verður til, at viðkomandi fakserfrøðingar verða tiknir við í arbeiðið hjá nevndini, undir hesum luttøku á nevndarfundum við serliga torgreiddum málum. | Sparikassin fylgir |
| 9. | Mælt verður til, at samstarvið millum stjórn og nevnd verður viðgjørt í minsta lagi árliga. Stjórnin skal ikki vera til staðar undir hesari viðgerð. | Sparikassin fylgir |
| 10. | Mælt verður til, at á heimasíðuni hjá limunum í Finans Danmark ella á samsvarandi hátt verður almannakunngjørt eitt yvirlit av luttøku hjá nevndarlimum á nevndarfundum og fundum í undirnevndum. | Sparikassin fylgir ikki<br><br>Nevndin hevur í 2024 havt tilsamans 17 nevndarfundir. Umframt hetta hava 5 fundir verið í tilráðingarnevndini. Nevndin leggur stóran dent á, at uppmøtingin er góð. Tá uppmøtingin til nevndarfundirnar í 2024 hevur verið omanfyri 80 % metir nevndin ikki, at orsøk er til at kunna meira nágreiniligt. |
| 11. | Mælt verður til, at limirnir í Finans Danmark taka støðu til ásetingarnar um loft av leiðslupostum ásett í lóg um fíggjarligt virksemi. | Sparikassin fylgir |
| 12. | Mælt verður til, at limirnir í Finans Danmark hava eyga við leiklutinum hjá uttanhýsis grannskoðara og dygdini av arbeiðnum, sum verður gjørt. Limirnir skulu m.a. seta krøv til samansetingina av teimum liðum, sum uttanhýsis grannskoðari brúkar, so tryggjast kann, at í minsta lagi tveir royndir grannskoðarar eru á liðnum við ískoytis førleikaøkjum. Fyri at vera royndur grannskoðari, skal viðkomandi hava gjøgnumført eftirútbúgving málrættað peningastovnsøkinum, umframt luttikið í grannskoðan av banka, sparikassa ella "andelskasse" í minsta lagi trý ár. | Sparikassin fylgir |


ns.fo